MASKINMEISTARAFELAGIÐ
GRØNLANDSVEGUR 58 POSTBOKS 3238 FO-110 TÓRSHAVN
TLF. +298 314718 FAX +298 318519 www.mf.fo mf@mf.fo

Tórshavn, 24. november 2023

Til
Løgtingsins Fíggjarnevnd

Hoyringsskriv viðv. løgtingsmáli nr. 36/2023 um skattaumskipan og tilhoyrandi mál.

Sambært samgonguni er skattaumlegging ein liður í arbeiðnum at gera tað liviligari hjá vanligum løntakarum og sperdum familjum.

Í samgonguskjalinum stendur millum annað soleiðis:

"Vit vilja lætta um gerandisdagin hjá løntakarum og familjum við skatta- og avgjaldslættum, styttri arbeiðsviku og ítøkiligari hjálp til sperdar familjur."

Og víðari:

"Lág- og miðallønt fáa ein skattalætta, sum verður fult fíggjaður".

At lætta um hjá teimum, sum eru ringast fyri, kann neyvan nakar vera prinsipielt ímóti.

Tær útrokningar, vit higartil hava sæð í Maskinmeistarafelagnum, vísa tó tíverri, at umleggingin rakar skeivt samanborið við tað, sum samgongan sigur seg vilja. Lág- og miðallønt fáa nevniliga lítið og onki burtur úr skattaumleggingini.

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum hevur í almenna rúminum gjørt nógv burtur úr, at serskipanir í í skattalóggávuni eiga at takast av fyri at javnseta skattaborgararnar.

Í Maskinmeistarafelagnum halda vit grundleggjandi, at skattalógin við øllum sínum ásetingum um skattastig, frádráttir, undantøk og so framvegis, er ein serskipan, øll sum hon er.

Men ein fortreyt fyri javnseting, tá tað ræður um skatt og avgjøld, má í hvussu er vera, at grundleggjandi arbeiðsfortreytir og -umstøður eru tær somu fyri øll.

Hesum leggja uppskotini um skattaumlegging og tilhoyrandi uppskot ikki upp fyri. Og uppskotini leggja als ikki upp fyri, hvørt ítøkiligu avleiðingarnar av javnsetingini raka javnt.

Um niðurlaging av fiskimannafrádráttinum og útfasing av frádráttum í uttanlandsinntøkum er meint sum skattlig javnseting, so kunnu vit í hvussu er staðfesta, at avleiðingarnar í hesum føri ikki taka nøkur atlit at javnseting.

Avleiðingarnar verða nevniliga serliga neiligar fyri øki uttan fyri Havnina. Tí har búgva lutfalsliga flest sjófólk íroknað útisiglandi sjófólk. Verða teirra skattligu viðurskifti gjørd verri enn nú, er avleiðingin ógvuliga sannlíkt, at fleiri teirra einfalt flyta av landinum fyri at spara i skatti.

Eisini fiskimenn eru lutfalsliga fleiri í kommununum uttan fyri høvuðsstaðarøkið enn í høvuðsstaðarøkinum, og tí rakar uppskotna niðurlagingin av fiskimannafrádráttinum eisini skeivt. Tí hon kann lættliga reka fiskimenn við føroyskum fiskiskipum av landinum. Frammanundan eru fiskimenn flýggjaðir undan stóra føroyska skattatrýstinum og hava bústað uttanlands, men

MASKINMEISTARAFELAGIÐ
GRØNLANDSVEGUR 58 POSTBOKS 3238 FO-110 TÓRSHAVN
TLF. +298 314718 FAX +298 318519 www.mf.fo mf@mf.fo

mynstra framvegis við føroyskum fiskiskipum. Ein lækking av fiskimannafrádráttinum kann lættliga verða tað seinasta skumpið, sum skal til, at aðrir fara sama veg.

Samanumtikið halda vit í Maskinmeistarafelagnum tað vera sera óskynsamt, einsæris at útfasa skattligu frádráttirnar hjá okkara útisiglandi sjófólki og niðurlaga fiskimannafrádráttin.

Eitt er ítøkiligu avleiðingarnar, ið kunnu væntast av hesum, og sum eru nevndar omanfyri, eitt annað er yvirskipaða skatta- og avgjaldsreguleringin í okkara samfelag. Í uppskotunum um skattaumlegging tykjast avvarandi politikarar hava gloymt, hvussu tann skattgjaldandi arbeiðsstyrkin í Føroyum er skrúvað saman.

Føroyar eru – enn í hvussu er – ein sjófarandi tjóð, og eitt av størstu samfelagsaktivunum er okkara vælútbúnu sjófólk. Siðbundni mobiliteturin í hesi arbeiðsstyrki ger hana bara til eitt enn sterkari aktiv, eisini tá tað ræður um skattainntøkur.

Men í Maskinmeistarafelagnum eru vit stórliga bangin fyri, at samlaða úrslitið av skattaumleggingini verður, at hesin mobilitetur fer fyri skeytið, og at í hvussu er skattainntøkurnar frá føroyingum í uttanlandssigling, har teir flestu eru yvirmenn í maskinrúminum ella á brúnni, verður minni enn nú, og at vandin veksur fyri, at tað sama hendir við skattainntøkunum frá føroyskum fiskimonnum við føroyskum skipum.

Her kann afturat viðmerkjast, at Maskinmeistarafelagið væntar, at við verandi gongd, verða ongir føroyskir fiskimenn eftir umborð á føroyskum skipum um 20 ár. Hyggja vit 20 ár aftureftir, er tilgongdin av navigatørum minkað við 46 prosentum og tilgongdin av maskinmeistarum við 17 prosentum. Samstundis er talið av fiskimonnum minkað við einari helvt, so at teir nú eru umleið 800 í tali.

Um politiska skipanin heldur okkara fiskimenn við teirra serstøku førleikum vera eitt aktiv, sum er vert at varðveita, og somuleiðis okkara maskinmeistarar og navigatørar, so eigur tað at síggjast aftur í sakligum politiskum arbeiði, ið grundleggjandi virðir hesi fólk og teirra førleikar og ikki, sum í verandi uppskotum, styggir tey frá sær.

Ein lítil uggi er tað tó, at vit ikki halda, at uppskotini fara at hava beinleiðis neiligar avleiðingar fyri sjófólk undir FAS-skipanini. Viðmerkjast skal tó, at felagið frammanundan heldur skipania hava nakrar veikleikar, ið gera tað trupult at lokka føroysk sjófólk at mynstra við skipunum undir FAS. Serliga er tað arbeiðstreytirnar, sum í dag eru betri aðrastaðni, tá talan er um útmynstring v.m., ið eru orsøk til hetta.

Í Maskinmeistarafelagnum hava vit hugsavnað okkum um eyðsýndu, beinleiðis ávirkanina, sum uppskotið um skattaumlegging við tilhoyrandi uppskotum hevur á okkara limaskara.

Vit hava ikki gjørt nakra neyva greining av øllum teimum uppskotnu broytingunum og teirra ávirkan. Tó sker tað í eyguni, at avgjøldini á brennievni skulu hækka nógv, uttan at lagt verður upp fyri, at hetta serliga fer at raka fólk, ið noyðast at koyra til arbeiðis, ofta langar teinar. Eisini her er tað serliga skattgjaldarar uttan fyri miðstaðarøkið, sum verða harðast rakt.

Vinarliga

Arnfinn Bech, formaður